

**ANNAÐ BEIN Í FINALUNI**

*Við tveimum málum á útivølli, hava víkingar allarhelst eitt bein í finaluni annað árið á rað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Víkingur vann grannauppgerðina

**LØGMANSSTEYPIÐ Víkingur dróg longra stráðið, tá teir bastu grannunum úr Fuglafirði í fyrra hálvfinaludystinum hóskvøldið. Endaliga úrslitið gjørdist 2-1 til felagsliðið, sum sostatt hevur góð kort á hondini innan returdystin í Sarpugerði**

Ólavur Øre Hansen

Víkingur hevur ongantíð tapt í Fuglafirði, tá talan er um landsella steypakapping, og í gjárkvøldið staðfestu teir støðuna sum ósigraðir í grannauppgerðunum á Fløtugerði. Víkingur var betra liðið og var spælstýrandi stóran part av dystinum, hóast fuglfirðingar løgdu seg á odda tíðliga í dystinum. Tó hevði ÍF ein gyltan møguleika at javna tá teir fingu brotspark seint í dystinum, men Poul Ennigarð brendi.

Tískil hevur Víkingur eitt sera gott útgangstøði innan returdystin í Sarpugerði, meðan fuglfirðingar skulu bretta uppu ermar, um teir ikki annað árið á rað skulu tapa hálvfinaluna móti grannunum úr Gøtu og Leirvík.

### Byrjaðu sum eitt óløgi

Frá dystarbyrjan vóru fuglfirðingar betur, og teir trýstu gestirnar langt aftur á vøllin. Av tí sama var truplult hjá Víkingi at fáa glið á egið spæl. Høga ÍF trýstið hevði við sær fleiri vandastøður í víkinga brotsteiginum. Tað var serliga eftir deyðbóltstøður at vandi var á ferð framman fyri víkinga málinum, har Gøtu brøðurnir á ÍF liðnum, Poul og Kaj, vóru ein stór hóttan í luftspælinum.

Trýstið hjá fuglfirðingum var úrtlit í 19 minutti, tá Poul Ennigarð skoraði eftir at bólturin hevði gingið leysur í víkingabrotsteiginum eftir hornaspark.

### Vendur skjótt

Tað er við fótbólti, sum við føroyska veðurlagnum. Tað kann venda skjótt, og var tað tilfeldið á Fløtugerði hóskvøldið. Eftir at fuglfirðingar høvdu verið spælstýrandi fyrstu 20 minuttirnar, so skuldu víkingar bert brúka 10 minuttir fyri at venda dystinum á høvdið. Fyrst javnaði Súni Olsen, tá hann skoraði uppá fríspark. Stutta løtu seinri legði Finnur Justinussen Víking á odda.

Serliga eftir fyrsta málið kom Víkingur betur við í dystin. Tað var sum um fuglfirðingar trektu seg longur aftur á vøllin, og hevði tað við sær at gestirnir gjørdust spælstýrandi. Súni Olsen og Nenad spældu sera væl á miðvøllinum hjá Víkingi, og dugdu teir væl at spreiða spælið út.

ÍF hevði trupulleikar av Súna og Nenad, og kom tað serliga væl til sjóndar eftir steðgin, har fuglfirðingar skuldu fram at trýsta. Teir høvdu trupult við at fáa fatur á miðvøllinum.

Fram móti dystarenda royndu fuglfirðingar at senda nógv fólk fram. Eitt nú kom Bartal Eliasen á vøllin, og hevði tað við sær at ÍF fekk brotsspark stutt undan dystarloki. Men ólukkutíð fyri fuglfirðingar, so misnýtti Poul Ennigarð henda gylta møguleikan.

Sostatt kom einki mál eftir steðgin, og tí vann Víkingur 2-1 í Fuglafirði. Við sigrinum hevur felagsliðið góð kort á hondini innan returdystin, sum verður spældur í Sarpugerði 8. Juni.

post@sosialurin.fo

**Niclas Niclasen:**

## Vit hava gott útgangstøði

*– Vit byrjaðu ikki alt ov væl, og ÍF kemur á odda, men vit vístu góðan stríðsvilja, og vendu dystinum, segði Niclas Niclasen eftir dystin, tá Sosialurin fekk orðið á hann.*

*– Tá vit so fingu glið á egið spæl vóru vit betra liðið. Tað eydnaðist hjá okkum at spæla upp ígjøgnum síðurnar, og komu til fleiri kjansir. Tískil er tað fult uppiborið at vit vunnu dystin, sigur Niclas.*

*Hóast Víkingur vann í Fuglafirði, so metir Niclas at einki er avgjørt enn. Sjálvandi hava vit betri útgangstøði við at vinna í kvøld, men ÍF hevur eitt sterkt lið, og skulu teir ikki undirmetast.*

*Seinri hálvfinaludysturin millum Víking og ÍF verður spældur í Sarpugerði 8. juni.*